# ni kann gera mun

máli. Og hjá Lív er hetta eitt mál, ið Gud hevur lagt á hennara hjarta at gera nakað við.

Kemur tað hartil, at hon fer at luttaka í hesum arbeiðinum, so verður tað kortini ikki einans týðingin, sum verður hennara arbeiðsøki. Fólk skula helst eisini læra seg at lesa hesa heilagu bók.

– Í samband við týðingina, so komi eg eisini at arbeiða við at læra fólk at lesa og at skriva. Samstundis við hetta, verður eisini arbeitt við at menna tey smáu lokalsamfeløgini á øðrum økjum, soleiðis sum ein sær tørvin á.

– So tað verður okkurt av hesum, sum eg helst komið at arbeiða við. Eg verði har, sum tørvurin er størstur, sigur Lív.

Í fyrstu atløgu kemur hon ikki at arbeiða við útbúgving sínari sum sjúkrasystir, men sum hon sigur:

– Tá fólk fáa at vita, at eg eri sjúkrasystir, so kann ein ikki umganga at tey banka uppá fyri at biðja um hjálp.

Tá tað so endaliga er avgjørt, hvar Lív kemur at útinna tænastu sína, skal hon av álvara í holtur við at læra seg málið, hjá tí fólkinum hon skal arbeiða millum.

– Hetta kann lættliga taka tvey til fýra ár. Alt er treytað av, hvussu ringt tað er at koma inn í mentanina og læra seg málið.

### Lívslang tænasta

Tá trúboðarar fara í onnur lond at arbeiða er ójavnt, hvussu leingi tey eru úti ísenn: Summi binda seg til eitt ávíst tíðarskeið, meðan onnur eru úti, so leingi sum tey duga at síggja, at Gud hevur brúk fyri teimum.

Á Føroyum eru dømir um trúboðarar sum hava verið úti í nærum fjøruti ár, meðan onnur eru úti í tvey til fýra ár. Men hvussu við Lív – hvussu leingi ætlar hon at vera úti sum trúboðari?

Skipanin, sum hon virkar undir er vanliga hon, at ein er tvey ár úti ísenn og kemur síðani heim í eitt hálvt ár, ella ein er fýra ár úti og so eitt ár heima.

– Men tá man er singul, sum eg, so er tað kanska í longra lagi at verða heima í eitt heilt ár, so eg havi valt at býta tað upp. Men sjálvandi, alt er ikki fastlæst, og tí ber til at variera hesi tíðarskeiðini, um tørvur er á tí.

– Men, hvussu leingi? Eg veit ikki, - eg hopi, at eg kann verða úti til eg verði 65 ár! Men, túveit, alt er opið, tí einki tíðarmál er sett á, sigur Lív.

### Hippokrit

At Lív nú er farin so langa leið sum til Senegal sum trúboðari hevur sjálvandi sína søgu, tí hon altíð hevur havt stóran áhuga í missiónsarbeiði.

Heilt frá tí at hon var ung, hevur hetta havt hennara stóra áhuga. Ikki beinleiðis tað, at hon sjálv skuldi fara avstað, men hon lurtaði altíð við áhuga, tá trúboðarar komu á vitjan í samkomuni í Porkeri.

Tað var serliga eitt orð úr Bíbliuni, sum hon hoyrdi ferð eftir ferð:

– Eg hoyrdi ofta nevnt hetta skriftstaðið, um at fleiri fólk mugu fara út í akurskurðin at arbeiða, tí tað mangla fólk. Tað bað eg so eisini um at Gud mátti gera, men tá ætlaði eg mær ikki sjálv avstað.

– Seinni helt eg meg tó vera ein "hippokritt", tá eg bað soleiðis, og ikki sjálv ætlaði mær avstað. So ein dagin segði eg bara við Gud, at vilt tú at eg skal fara, ja, so fari eg, sigur Lív.

Hon sigur, at hon ikki sum so hevur fingið nakað serstakt kall frá Gudi, men heldur hetta, at "Her eri eg, send meg!".

Og soleiðis bar tað til, at hon nú er komin til Senegals sum trúboðari.



# ú avstað

kærastu heilsur til tín, nú tú fer avstað. Minst til, at tann veldigi Gud, sum var við Mósesi, tá ið hann var sendur avstað, er tann sami í dag. Hann sum við skýstólpa um dagin og við eldsúlu um náttina fylgdi Sínum fólki, sum gjørdi beiskt vatn drekkandi, sendi føði av Himli, gav vatn úr klettinum og bað Móses gera koparorm til bjarging fyri fólkið.

Tú hevur funnið náði fyri eygum Guds við trúgv á Harran Jesus, og hann kennir teg við navni. Hann hevur lovað: "Eg skal als ikki sleppa tær og als ikki fara frá tær".

Vit vilja so fegin verða ein liður í hesum so týdningarmikla arbeiði. Vit ynskja at koma at kenna tað fólk, sum tú kemur at liva millum. Verða tað bakland, sum kann stuðla tær. Bæði tá ið gongur væl, og ikki minni, tá ið á stendur. Lat okkum fáa tað at vita, so vit saman kunnu, hóast langt burtur frá hvørjum øðrum, møtast framman fyri ásjón Guds í bøn. Vónandi hevur tú møguleikan at senda teldupost, so skjótt kann hoyrast millum okkum.

Vit ynskja tær ríku signing Guds, og Jesus fylgi tær.



*Lív, saman við mammuni Sigrid Poulsen*

# Fyrsta heilsan úr Senegal

Ein lítil heilsan úr Senegal. Her gongur sera gott og tað er gott at verða aftur í Afrika. Sjálvt um tað minnur nógv um Gambia er tað ørvísið álíkaval. Her í Dakar búgva 3 milliónir fólk. Og her eru fólk allastaðni og trongt er á vegnum og gongubreytini. Her er eisini sera nógvur larmur alla tíðina. Veðrið er sera gott, eini 25 gradir um dagin, so tað er alle tiders.

Eg kom til Dakar týsdagin (1. mars, blm.) kl 00:30. Eitt sindur seinni enn vænta. Flogfarið úr Keypmannahavn til Brússel var 1 tíma seinka, og flogfarið úr Brússel til Dakar 5 tímar seinkað, og so millumlendu vit eisini í Spanien og vóru har í ein tíma. So eg var móð tá eg endiliga kom á Gestahúsi hjá New Tribes Mission (NTM). Fólk var eftir mær á flogvøllinum, og eg hevði ongar trupulleikar at koma ígjøgnum toll ella nakað annað, so tað var gott. So eg var glað tá eg hevði fingið eitt gott brúsubað, og kundi leggja meg í vatnsongina, og eg svav sum steinurin.

Mikudagin byrjaði so kunningin, so nú er høvdið um at bresta. Eg, og eitt annað par, møta sum oftast 2-3 ferðir um dagin við ymiskum fólkum. Vit eru eisini boðin út til døgurða og náttura hvønn dag. Vit eru sera væl móttikin allastaðni og øll eru sera blíð.

Mikukvøldið slapp eg so eisini at royna meg, av tí at Anna Rodda (ein føroyskur trúboðari her niðri) var sjúk. Men eg sá skjótt, at eg ikki var før fyri at hjálpa henni, og tí blivu boð send eftir lækna. Hon bleiv innløgd á eini klinikk, sum er tætt við her og hevur tað nógv betur nú. Hon verður innløgd í nakrar dagar afturat.

Í gjár bleiv so e-mailið ordnað, so nú kann eg nýta mína egnu teldu. Vit vóru eisini ein lítlan túr í býnum í gjár og royndu eisini at taka ein taxabil. Tað var bara stuttligt at sleppa at royna seg. Vit vóru eisini í ymiskum handlum og kannaðu prísir á ymiskum, sum eg skal keypa. Var eitt sindur sjokerað yvir at síggja, at tað mesta her niðri kostar tað sama sum í Føroyum.

Eg komi at verða her á gestaheiminum til 15. mars, og síðani skal eg búgva saman við eini, sum eitur Diane, hon er eisini við NTM. Men tað verður kanska eisini møguligt hjá mær at leiga eina íbúð frá 1. juni til síðst í septembur. Hon er beint við gestaheimið hjá NTM. Onkur sum hevur sæð hana, helt at hon kanska var eitt sindur primitiv. Har er einki heitt vatn og næstan eingir møblar. Eg fari at hyggja at henni mánadagin ella týsdagin, og so fáa vit at síggja, hvat tað blívur til.

Hjartaliga takk fyri forbønirnar sum hava so ómetaliga stóran týdning og hjartaliga takk fyri peningagávurnar sum eg fekk áðrenn eg fór avstað.

Harrin vælsigni tykkum.

Kærar heilsanir
**Lív**